FØROYA
ÓÐALSFELAG

fo@mail.fo

www.odalsfelag.fo

HOYRINGSSKRIV Føroya Óðalsfelag 21.4.2023 - Vinnunevndin

Føroya Óðalsfelag undrast á, og harmast um, at vit, sum umboða føroysku ognarjørðina, knapt helvtina av allari jørðini í Føroyum, als ikki eru tikin við uppá ráð, í samband við lóggávuarbeiðið LM-053/2022: Uppskot til løgtingslóg um grundvatn.

Í uppskotinum § 2. verður "Grundvatn" allýst sum "…vatn, sum situr í rivum, fláamørkum og opum í undirgrundini í mettaða beltinum."

Sum nakað av tí fyrsta í viðmerkingunum til lógaruppskotið, stendur at "kelduvatn" er "…grundvatn, ið spríkir úr undirgrundini…"

Men longu í §5 stendur, at ognarfólk skulu søkja landsstýrismannin um loyvi at brúka okkara egna vatn, um "grundvatnið" knappliga rennur upp av sær sjálvum, á okkara egna matrikli?

Eftirsum tað kann verða sera ivasamt júst hvat er hvat, og eftirsum tað kann fáa sera stórar avleiðingar fyri ogn og ognarrætt hjá óðalsfólki, so hevur tað alstóran týdning, áðrenn ein tílík lóg verður latin úr einum aðalráði, og áðrenn hon evt. verður sett í gildi, at staðfesta hvussu hesi hugtøk eiga at verða allýst, og avmarkaði mótvegis hvørjum øðrum.

Eitt, sum er sera avgerandi í hesum máli um grundvatn, er at skilja ímillum omanávatn og grundvatn.

Har er als eingin ivi um, at sterkir vinnuligir aktørar vilja sleppa framat vatninum í okkara høgum, og hava ilt við at góðtaka, at jarðareigarnir hava sterkan lógarásettan ræðisrætt til vatnið, sum er ásett í grein 1 í lóg um indsø. Sambært nevndu lóg hava jarðareigarnir ræðisrættin til omanávatnið, men hava skyldu til, um tørvur er á tí, at lata kommununum omanávatn til drekkivatn til borgarnar. Vanliga verður sagt, at kelduvatnið er besta vatnið tú kanst fáa.

Í viðmerkingunum til §1 í lógaruppskotinum, um skilnaðin millum omanávatn og grundvatn stendur, at til dømis grundvatn rennur út á ymiskan hátt, m.a. gjøgnum keldur, t. d. í Varmakeldu í Fuglafirði.

Hetta man vera ein misskiljing. Varmakelda í Fuglafirði er ein vanlig kelda, og at meta sum omanávatn, eins og aðrar keldur kring Føroyar. Talan er ikki um grundvatn, men omanávatn.

Verða nú allar hesar keldur grundvatn, missa jarðareigararnir ræðisrættin yvir øllum keldunum.

Í øðrum lagi hevur tað alstóran týdning, at greina, hvussu hetta lógaruppskotið fyriheldur seg til gamlar føroyskar siðvenjur og galdandi føroyskar lógir.

Vit hava eina grundlóg sum verjir ognarrættin, og øll tey serstøku hevdvunnu, og dynamisku lunnindi sum liggja til hendan serrættin. Vatnið hevur allar dagar verið eitt lunnindi, sum liggur til jarðarognina. Hetta stendur púra greitt.

Allir 477 hagapartar í Føroyum, eru matrikuleraðir. Í øllum høgunum fyriliggur ein matrikuldómur, sum staðfestir ognarrættin hjá ognarfólki í teimum einstøku høgunum.

Í Lov om Vandledningar frá 1909 er ásett, at jarðareigarin hevur ræðisrættin til vatnið.

Í Lov om Benyttelse af Indsøer og Vandløb frá 1937 er ásett í §1, at jarðareigarin hevur ræðisrættin til vatnið í vøtnum, áum ella áarløkum, sum eru í tí einstaka haganum. Tað skerst ikki burtur.

Í "lóg um indsø frá 1937" grein 1. stendur:

> "Hvor ikke særlige retsforhold, lov eller sædvane medfører afvigelse, har grundejeren som sådan rådighed over det vand, der findes i indsø, å eller mindre vandløb inden for ejendommens grænser."

Og rådighed merkir ræði, at hevur tú ræðið á einum luti ella einari ogn uttan stórvegis skerjingar, kann tað eins væl verða sagt at tú eigur nevndu ogn. Hetta svara til orðatakið, sum man verða kent um allar Føroyar "(Hann) eigur ið brúkar».

Tá orðið «mindre vandløb» verður nevnt, er uttanfyri allan iva, at talan er um keldur, t.d. hoppikeldur ella flotkeldur sum tað eisini verður nevnt. Í keldunum, og runt um keldurnar er gott bit hjá seyðinum. Talan er um omanávatn, og tí hoyrandi til ræðisrættin hjá jarðareigarunum.

Sum áur nevnt, er kelduvatnið eisini sera gott drekkivatn sum kommununar ofta gera nýtsla, til borgarnar. Nýtslan av vatni er bert til vanligar borgarar, og er ikki til vinnulív.

Tí er eingin ivi um, at kelduvatn ikki er grundvatn, men omanávatn, sum jarðareigarnir hava ræðið á.

Fyri at taka bara eitt dømi, um áskoðanina at jarðaeigarnir eiga vatnið, kann nevnast vatntøka hjá Runavíkar Kommunu úr Toftavatni, har kommunan í 1978 gjørdi sáttmála við hagarnar um loyvi at taka vatn úr Toftavatni, móti árligum gjaldi til hagapartarnar.

Tá SEV misti einkarrættin í 2012, var eingin ivi um at ognarrætturin til vatnið framvegis var hjá teimum, sum áttu vatnið, jarðareigarunum, áðrenn orkan var tikin úr vatninum.

Í 1909-lógini «Lov om vandledninger» stendur rímiligt, at jarðareigarin má tola, at kommunan tekur vatn úr ánni til drekkivatn. Eingin fer at seta seg ímóti eini kommunalari verkætlan sum skal tryggja drekkivatn til okkara medborgarar.

Men, trupuleikin fyri jarðareigarnar kann lættliga gerast ein heilt annar, um lógaruppskotið ikki tekur hædd fyri hesum vanda. Tí ognarfólk vita eisini, av ringum royndum, hvussu stórt trýstið er á ognarrættin, frá stórum alifyritøkum sum vilja tryggja sær so ómakasleysa og bíliga atgongd til okkara vatn sum gjørligt. Fáa fyritøkurnar ikki atgongd sjálvar, og beinleiðis, so hava vit í Óðalsfelagnum tíverri sæð fleiri dømi um, hvussu alifyritøkur fáa kommunurnar til at útvega sær vatn, teirra vegna.

Júst tí er orðingin um «almennar myndugleikar» ikki nøkur góð trygd, móti sterkum vinnuligum áhugamálum, sum megna at leggja ógvusligt trýst á smáar jarðareigarar, og smáar kommunur, fyri at sleppa framat vatninum.

Tað framgongur greitt, at rættarpraksis frá almennari síðu er, at tað almenna viðurkennir lógina frá 1909, har jarðareigarnir hava ræðisrættin til vatnið. Har er eisini rættarpraksis at vísa á, at tað almenna eisini viðurkennir, at jarðareigarnir eiga grótið undir jørðini hjá teimum, og tí er tað eisini nærlagt at hugsa, hví jarðareigarnir so ikki eisini hava ræðisrættin til vatnið?

Hvar er markið fyri ognar- og ræðisrættinum niðureftir? Ognarrætturin røkkur so djúpt sum áhugamál hjá jarðareigarum røkka. Sum dømi um hetta verður víst til fjøru- og strandarrættin hjá jarðareigarunum, har ásett verður, og praksis altíð hevur verið, at ognar- og ræðisrætturin røkkur so langt sum hestur grynnur, sum hestur kann vassa, á fjøru. (Sí meira um hetta, t.d. hjá Sorinskrivara og løgfrøðingi E. A. Bjørk og løgfrøðinginum Poul Petersen.)

Málið er beint í Vinnunevndina, og av tí sama ganga vit bara út frá, at júst tílíkir spurningar og ivamál sum omanfyri nevnt, verða væl og virðiliga gjøgnumgingin.

Vit í Óðalsfelagnum áttu at havt verið við frá byrjan av, so vit fingu okkara lógliga rætt og møguleika at ávirka upprunauppskotið.

Sagt verður eisini, at hetta lógaruppskotið er lutvíst grundað í løgtingslóg nr. 53 frá 28. apríl 2000 um vatnið í sumbiarbergholinum? Hvussu hetta skal skiljast, eigur myndugleikin sjálvandi ikki at verða einsamallur um at allýsa, og tí eigur Føroya Óðalsfelag at fáa høvið til at ávirka og greiða hesar spurningar og ivamál.

Eitt er so tað problematiska í, at hetta lógaruppskotið ikki var sent til hoyringar hjá jarðareigarunum.

Annað sum ei heldur kann góðtakast er, at viðmerkingarnar til lógaruppskotið staðfesta, at tað ongar avleiðingar fær fyri okkum. - Jú, hendan lógin kann so víst fáa nógvar og neiligar avleiðingar fyri okkum mongu túsund fólk úti um alt landið sum eiga jørð. Bæði fíggjarligar avleiðingar, og umhvørvisligar avleiðingar, fyri landbúnað og landbúnaðarvinnu, fyri serstakar bólkar og øki í landinum, og ikki minst, sum omanfyri nevnt, fyri sjálvan privata ognarrættin og avgerðarrættin.